# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Sankta Josefs Barnagarður:

## Systir Louisa 40 ára starvsdag



*Heðin Mortensen segði nøkur orð og handaði Louisu blómur frá Tórshavnar kommunu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjadagin 26. august var ein lítil hátíðarløta í Sankta Josefs Barnagarði í Havn í sambandi við at systir Louisa hevði arbeitt 40 ár á stovninum.

Louisa visti av ongum hendan morgunin. Starvsfólkini høvdu lagt hátíðarløtuna til rættis, uttan at hon visti av. Øll starvsfólkini vóru savnaði, og borgarstjórin Heðin Mortensen kom á vitjan og segði nøkur orð og handaði henni blómur frá Tórshavnar kommunu.

Systir Louisa er ættað úr bygdini Westerlo í Norður Belgiu. Hon kom til Føroya í 1965 og byrjaði beinanvegin í Sankta Josefs Barnagarði, har hon hevur arbeitt síðan. Seinastu 38 árini hevur hon verið leiðari á stovninum.

Sankta Josefs Barnagarð varð stovnaður í 1931 og verður sostatt 75 ár í 2006. Barnagarðurin varð settur á stovn sum ein privatur stovnur, men síðan 1958 hevur hann verið sjálvsognarstovnur.

Louisa var 27 ár gomul tá hon byrjaði, og er hon í dag 67 ára gomul. Enn trívist hon væl millum tey 80 børnini og 16 starvsfólkini, harav tey 11 eru pedagogar.

## Tøkk

Til øll tykkum mongu, sum mintust meg á áttati ára degnum. Tit, sum ringdu, sendu fjarrit og gávur. Øll tit mongu, sum komu og heilsaðu upp á meg. Vita skulu tit, at tit gleddu meg ómetaliga nógv. Harrin signi tykkum.

*Blíðar heilsanir*
**Halda**

†

Kunngjørt verður at kæra kona mín og mamma okkara

**Elsuba Jegind, fødd Høgnesen**
**ættað úr Leirvík**

andaðist í heiminum í Horsens týsdagin 23. august, 58 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Hebron í Leirvík sunnudagin 28. august, kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Keld, Marie og Niels**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at okkara góða kona, mamma, vermamma og omma

**Oddjó Brekká,**
**Hvalvík,**
**ættað úr Tjørnuvík**

andaðist í heiminum, hósmorgunin, 63 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Familjunnar vegna,*
**Jákup**
**Martin og Hanus v/familju**

## Jarðarferð

Kistan við

**Tummas Johannesen,**
**Glyvrar,**

kemur í Glyvra kirkju mánadagin umleið kl. 16.00.

Jarðarferðin verður týsdagin kl. 14.00.

*Fyri tey avvarðandi,*
**Gunnvør, Rúni og Durita**

VIÐMERKINGAR

## Luftdálking frá skipum

**(umrøðan í Kringvarpi Føroya)**

**Sjúrður Guðjónsson**

Bæði SVF og útvarpið hava í vikuni havt nøkur innleg um luftdálking frá skipum. Ongastaðni í innleggunum verður víst á hvørjar altjóða avtalur regulera nevndu luftdálking, men undirforstaði er ivaleyst, at tað er Kyoto-avtalan sipað verður til, tá tað fyri tað mesta verður víst til koltvíiltudálking.

Tá Eyðun Eltør var landsstýrismaður í olju- og umhvørvismálum kom fram, at føroyingar fóru at bíða við at ratifisera Kyoto-avtaluna, tí ein komandi frálandavinna fór at økju um koltvíiltu útlátið. Eisini var tá nevnt nakað um skip - at ein stórur partur av okkara koltvíiltu útláti stavar í løtuni frá skipum - soleiðis at vit ikki uttan víðari kundu undirskriva avtaluna, sum leggur upp til minking av útlátinum.

Sami undirtóni er nú í kjakinum í Kringvarpinum. Kyoto-avtalan áleggur flagstatum at minka um útlátið frá skipum. Men er hetta so....?

Havi seinastu dagarnar roynt at kanna hesi viðurskifti. Tað, sum eg fyribils haldi meg hava funnið útav er, at Kyoto avtalan umfatar ikki skip í heilatikið.

IMO - altjóða sjóvinnufelagskapurin undir ST - arbeiðir í løtuni við einari "indexskipan" fyri skip.

Hetta fer helst at snúgva seg um nøkulunda somu kvotaskipan sum Kyoto-avtalan ásetur í samband við t.d. idnaðin á landi, har tey ymisku londini fáa tilluta eina ávísa umsetiliga kvotu av koltvíiltu útláti. Menningarlondini fáa stórar kvotur, meðan ídnaðarlondini fáa eina smærri kvotur.

Sum skilst er nevnda arbeiði í IMO nærum uppsteðgað og verður allarhelst ikki liðugt tá Kyoto avtalan verður endurskoða í 2012.

Hinvegin hevur IMO arbeitt við einum nýggjum Annex til MARPOL-konventiónina - Annex VI. Her skulu øll skip (eisini fiskiskip) yvir 400 BT frá 2008 hava útgerð, sum generelt minkar um luftdálkingina. Eisini skulu skipini kunna dokumentera hvussu hetta verður gjørt við m.a. mannagongdum og skrásetingum.

Mín niðurstøða er, at Kyotoavtalan ongar ásetingar hevur um skip, men at hetta møguliga verður ein partur av endurskoðanini í 2012.

Tað kann eisini hugsast at "ískoyti" frá flagstatunum til Kyoto-avtaluna, júst verður tað nýggja Annex VI í MARPOL-konventiónini. Tá skip, serliga handilsskip, verða javnan handlaði millum lond (flagstatir), er væl hugsandi at "dálkingarkvoturnar" verða býttar út á skipini, reiðarnar ella okkurt líknandi.

Vil at enda heita á Kringvarpið um at lýsa hetta sera áhugaverda og viðkomandi evni nærri, serliga við atliti til altjóða avtalur og konventiónir.

*Tórshavn, 26. august 2005*